Havnargentan Kvøður ella Í dans

1.

Nú gerast kvøldini myrk og long,
og lítið eg dugi at tvinna.
Heima her gerst mær stovan ov trong,
hvar skal eg mær stuttleika finna.
Frægast man vera at fara í dans,
heimalambið er har, eg gevi tí ans.
Í klubbanum hittist mangt par,
har man finnast eitthvørt vakurt fyri mær.

2.

So klæði eg meg í mín stutta serk,
ið neyvan til kníggja man røkka.
Silkisokkar og skógvar av lakk,
ið brádliga sundur munnu støkka.
Skjótt er at greiða mítt dreingjahár,
so klíni eg smyrsl uppá kyssusár.
So er "daman í galla og fjong,"
nú bert tørvar mær ein "heimalambs-drong."

3.

Mót klubbanum seti eg mína kós.
Har "jass-banda streingirnir grenja."
Gævi eg fann mær ein fittan matrós,
sum eg út í dansin kann venja.
So kvikliga stígi eg um klubbans gátt.
Eg veit at eg fái eina stuttliga nátt,
tá eg síggi ein fittan korporál,
hann skal verða í kvøld mítt høvuðsmál.

4.

Við blíðum eygum og bros á kinn,
eg tíðum á hann man kveita.
Fittari dreingi í hold og skinn,
tú leingi eftir skalt leita.
Hann hyggur og hann brosar yvir móti mær.
Hann kennir at eg havi hug á sær,
og so stígur hann fram, ger eitt bukk,
"må jeg be om en dans frøken smuk."

5.
Til jass-bandans grenjan vit fara á flog,
og fram eftir gólvinum reika.
Eyguni hittast og bera boð,
meðan hjartað í ørsku man leika.
Hann lýður mær í oyrað: "Vi ta'r os en tur,
her bliver så trangt som i et fangebur."
Og úr klubbanum hvørva vit brátt,
fyrst nú byrjar hin stuttliga nátt.
6.
So vinarliga hond í hond,
vit undan fólkinum renna.
Steðga forpøst har yviri við Strond,
har eingin okkum man kenna.
Mánin hann skínur yvir Nólsoyarfjørð.
Hann skínur og glampar so vit verða ør.
Á teir knappar teir skína sum gull,
eg av elskhugi verði so full.
7.
Eg kvøði ei meira um hesa nátt,
eg livdi upp fleiri slíkar.
Eg drongurin fittur, og veðrið er gott,
so alt eftir vild seg líkar.
Hugurin er góður, av besta slag,
um teir koma aftur, ella fara avstað,
og tá vit ikki longur fáa drong,
ja so fara vit allar undir Kong.